# Lukturin frá bakarínum

HELGI ABRAHAMSEN



Føroyar hava fingið nýggjan landsstýrismann í fíggjarmálum, og sigast má, at hann hevur gjørt vart við seg við nógvum hugskotum um, hvussu fíggjar- og búskaparpolitikkurin her á landi skulu rekast.

Men ikki allir politikarar eru so glaðir fyri hesi hugskotini. Løgmaður royndi fyrst at bera yvir við honum og segði, at hann (løgmaður) skuldi taka sær av at læra mannin politiska fakið. Seinni komu aðrir við sterkari lúti og søgdu, at um manninum ikki dámdi “luktin frá bakarínum”, mátti hann heldur finna sær annað arbeiði. Sagt við øðrum orðum, so skuldi Magni Laksáfoss velja ímillum at góðtaka bæði góða og ringa siðvenju, ella kundi hann pakka saman. Har skuldi einki broytast.

Úrslitið av hesum er, at nú fíggjarlógaruppskotið fyri 2008 er lagt fyri tingið, eru nógv av uppskotunum hjá landsstýrismanninum feigað av borðinum. Ella fyri at brúka myndina av bakarínum, so hevur tað eydnast at halda nøkulunda fast við tann gamla, kenda luktin.

Men nú koma somu menn og siga við fjølmiðlarnar, at útreiðslurnar á fíggjarlógaruppskotinum vaksa ov nógv, og avlopið er ov lítið. “Bakaravørurnar” smakka teimum ikki væl, tí smakkurin minnir ov nógv um luktin á bakarínum. Teir hava eftir øllum at døma funnið útav, at tá vit brúka fleiri pengar, verður avlopið minni. Luktur og smakkur fylgjast at. Tí bjóða teir seg til at ganga ígjøgnum alt uppskotið, konto fyri konto, fyri at vita um tað ikki ber til at fáa størri avlop. Teir vilja broyta smakkin á bakaravørunum, uttan at broyta luktin á bakarínum.

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevði uppskriftina upp á eitt størri avlop, men hon bleiv feigað av borðinum. Men hava hesir, sum nú stíga fram, eitt veruligt ynski um størri avlop á landsins fíggjarlóg (eitt avlop, sum ikki hvørvur aftur í eykajáttanum), so kann eingin hava nakað ímóti tí. Men teir mugu vera fyrireikaðir til, at hetta í seinasta enda kann geva ein øðrvísi lukt á bakarínum.

# Systematisk lægesjusk I.

SOFUS HANSEN

9850 Hirtshals

I den seneste tid har færøernes største avis, Dimmalætting, bragt et par gruopvækkende historier om færøske lægers sjusk med deres kræftpatienter. Med henblik på, at jeg som så mange andre færinger, har haft disse mennesker inde på livet, føler jeg stor smerte og sorg i mit hjerte, når jeg læser disse beretninger. Her tænker jeg ikke kun på den kræftramte, men også på de pårørende.

Jeg er imidlertid kommet i den tvivlsomme situation, at jeg er kommet i besiddelse af nogle dokumenter, der ifølge en færøsk advokat, er så belastende for det færøske sygehusvæsen, at de for alt i verden ikke må komme ud til offentlig beskuelse. Derfor har jeg selvfølgelig tænkt mig at offentliggøre dem.

Men inden jeg går i offensiven, har jeg følgende spørgsmål til landslægen Høgni Debes Joensen, socialministeren Hans Pauli Strøm, overlæge Jan Jespersen, ledelsen på sygehuset i Torshavn, Tværø og i Klakksvig:

Hvordan kan det være, at antallet af kræftpatienter, der dør årligt, er stigende? Hvor mange har fået stillet diagonosen kræft i perioden 1999 til september 2007? Er samarbejdet mellem sygehusene på Færøerne og Rigshospitalet forbedret? Kører patalogisk afdeling med 100% kapacitet? Hvor mange patologer var ansatte på patalogisk afdeling i 1999, 0000, 2001, 2002, 2003, 2004, 2005, 2006 og frem til september 2007?

Et sidste spørgsmål: Er Færøernes Ulykkeforsikring ophørt med at eksistere, eller er det Almannastovan (Socialforvaltningen), der styrer Færøernes Ulykkeforsikring I dag? Hvem er hovedsansvarlig for Færøernes Ulykkeforsikring?

I nærmeste fremtid vil jeg som sagt offentliggøre nogle dokumenter, der beviser, at der efter al sandsynlighed foregår et systematisk lægesjusk i det færøske sundhedsvæsen, et sjuskeri, der er så groft, at det ikke tåler dagens lys. Ligeledes vil disse dokumenter bevise, at det kort sagt er dødens farligt at være kræftpatient på Færøerne.

E-mail: hanstyson@hotmail.com

PS.: Fortsættelse følger.

# Føroya fólk betur farið uttan Fólkaflokkin

BJØRN KALSØ

landsstýrismaður



Kravið frá Sambandsflokkinum var ein tálmandi fíggjarlóg - hetta eydnaðist okkum - hóast Fólkaflokkurin ikki kom við einum uppskoti um sparingar í rakstri, nøkrum boði uppá, hvussu íløgurnar skuldu raðfestast ella meining um, hvat avlopið á fíggjarlógini skuldi vera.

Í blaðgrein í Dimmu, týsdagin 25. september 2007, nevnd “Føroyafólk vann við Fólkaflokkinum” finst Jógvan við Keldu, løgtingsmaður, at førda fíggjarpolitikkinum hjá landsstýrismanninum við fíggjarmálum. Eisini rósar hann sínum egna flokki fyri lutin í fíggjarlógararbeiðinum.

Landsstýrismaðurin mælti til at strika skattalættan komandi ár, fyri á tann hátt at tálma hitaða búskapinum. Hetta hevði merkt eina meirinntøku til landskassan upp á 104 mió. kr. og hevði samstundis verið við til at tryggja landskassanum neyðuga yvirskotið, uttan at seta aðrar inntøkugevandi skipanir í verk. Men Fólkaflokkurin vildi ikki hoyra talan um hesa loysn, tíansheldur koma við boði uppá, hvussu landskassin skuldi fáa neyðugu inntøkurnar. Fólkaflokkurin vildi heldur ikki hoyra talan um sparingar á málsøkjum, sum teirra landsstýrismenn umsita.

**Fastlæsta støðan**

Fólkaflokkurin var í samráðingunum at líkna við eina øðu, ið ikki fekst at lata skelina upp. Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum fekk tí umsitingina at koma við uppskotum og tilmælum um, hvussu inntøkur kundu fáast á annan hátt, fyri at tryggja nøktandi avlop og fyri at leggja trýst á Fólkaflokkin.

Fíggjarmálaráðið vísti á fleiri møguleikar at útvega inntøkur til landskassan. Uppskotini vóru løgd fyri flokkarnar, so støða kundi takast til, um undirtøka var fyri onkrum av teimum.

Nú hoyknaði Fólkaflokkurin í skattalættaspurninginum. Men við tað, at Javnaðarflokkurin tíverri helt seg tætt uppat skattapolitikkinum hjá Fólkaflokkinum, slapst ikki undan at koma við uppskotum um onnur hægri avgjøld á m.a. søtmeti og leskidrykkir, fyri at tryggja neyðuga avlopið. Haldi tað vera óheppi við slíkum avgjaldshækkingum, tí at nógvar sukurvørur kunnu metast sum neyðsynjarvørur, og tí at leskidrykkir verða framleiddir í Føroyum. Avgjøld á føroyska framleiðslu er í sjálvum sær skeiv gongd. Vit eiga heldur at gera alt fyri at stuðla føroyskari framleiðslu. Heilsupolitiskt eru hesi uppskot heldur ikki rætt gjøgnumførd. Seinnu árini eru eftir mínum tykki alt ov nógvar avgjaldshækkingar ella óbeinleiðis skattingar lagdar á borgaran. Hetta rakar jú øll, eisini tey, ið hava ov lítið frammanundan.

**Samanumtikið**

Tað eydnaðist okkum at gera eitt tálmandi fíggjarlógaruppskot, har minstiforvinningurin er hækkaður, og har skattalættin til fiskimenn og rentustuðulin til sethúsabygging er varðveittur. Sambandsflokkurin umsitur hesi mál í samgonguni.

Fari tó at enda við at heita á Jógvan við Keldu, løgtingsmann, í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógini at virka fyri, at ætlaðu avgjøldini á søtmeti og leskidrykkir verða strikað, fyri heldur at stramma skattalættan so mikið, at avlopið á fíggjarlógini verður tað sama. Slík loysn rakar sosialt rættari, tí vil Sambandsflokkurin stuðla henni. Hetta átti eisini at hóska betur nýggju sosialliberalistisku kósini, sum Fólkaflokkurin hevur boðað frá við formansskiftinum, nú Anfinn Kallsberg er givin.

Nei, eg eri sannførdur um, at hesaferð vann Føroya fólk ikki við Fólkaflokkinum. Føroya fólk var heilt víst betur farið uttan Fólkaflokkin.

# Veðurlagsbroytingar í Kringvarpinum

IVAN NICLASEN

Programmleiðari, Sjónvarpið

Tann 9. september sendi Kringvarp Føroya sjónvarpssendingina “Svik við upphitingini av jarðarknøttinum”, sum upprunaliga varð framleidd til enska Channel 4 í vár. Hendan sendingin gongur beint ímóti galdandi uppfatan av orsøkini til veðurlagsbroytingarnar í heiminum í dag. Í dag vilja tey allarflestu vera við, at veðurlagsbroytingarnar koma av mannaávum. Sendingin hjá Channel 4 vildi vera við, at talan er um aðrar høvuðsorsøkir.

Viðurkendi granskarin Bogi Hansen hevði hvassliga at Kringvarpi Føroya fyri at hava sent sendingina, fyrst í viðmerkingum í Sosialinum tann 10. September, og síðani aftur í lesarabrævi í sama blaði tann 20. september.

Høvuðssjónarmiðið hjá Boga Hansen er, at Sjónvarpið als ikki skuldi sent sendingina, tí tey eru so fá, sum í dag taka undir við uppáhaldinum, at veðurlagsbroytingarnar ikki koma av mannaávum. Harafturat vóru bæði feilir og grovar skuldsetingar í sendingini smbrt. Boga.

Atfinningarnar hjá Boga Hansen eru bæði prinsipiellar og áhugaverdar. Í viðmerkingum í Sosialinum tann 10. september førdi eg fram, at ein av høvuðsuppgávunum hjá Sjónvarpinum er at lata fólk koma til orðanna. Í hesum føri mugu vit staðfesta – um okkum dámar tað ella ikki – at tað finnist ein minnilutabólkur av granskarum, sum hevur eina aðra frágreiðing um fyribrigdið enn Bogi Hansen, Al Gore og meirilutin annars. Hesi fólk kunnu ikki bara tigast burtur.

Tað er heilt einfalt av alstórum týdningi fyri fólkaræði, at ein ‘public service’ stovnur sum Kringvarpið loyvir fólkum, sum hava aðrar niðurstøður enn tær til eina og hvørja tíð ráðandi, at sleppa framat.

Tað er løgið, at hvørki Birgir Kruse ella Uni Arge, sum eisini gera viðmerkingar til málið í Sosialinum tann 20. september hava eygu fyri eini so grundleggjandi skyldu hjá einum ‘public service’ miðili. Tí onki kjak kann byrja, fyrr enn fólk við ymiskum meiningum eru sloppin til orðanna. Hetta eru eisini høvuðsgrundgevingar hjá Channel 4 fyri at lata sendingina framleiða, og hjá DR2 fyri at vísa sendingina.

Bogi Hansen setir spurningin, um Sjónvarpið við hesi sendingini er á veg út á eina hálkubreyt, har bæði fjølmiðlaetikkur og fjølmiðlapolitikkur verða givin upp til skutil fyri at tekkjast hyggjarum við alsamt fleiri gølukendum sendingum. Birgir Kruse er inni á sama leisti, tá hann tosar um, at Sjónvarpið hevur mist sín leiklut sum høvuðsveitari av tíðindum og undirhaldi samstundis sum, at stovnurin skal tryggja sær hyggjarar.

Sjónvarpið vísti ikki sendingina “Svik við upphitingini av jarðarknøttinum” fyri at undirhalda ella tekkjast hyggjarum. Tað eru fleiri ár síðani, at vit sleptu ta strategi at stremba eftir høgum hyggjaratølum fyri útlendsku sendingarnar. Hetta hendi samstundis, sum fólk sóu alsamt fleiri rásir um fylgisvein. Hinvegin gera vit eina fjølbroytta skrá bæði til fjøldina og til tey fáu. Og tey, sum fylgja við í útlendska tilfarinum í sjónvarpinum vita eisini, at her er talan um bæði populerar sendingar og um smalar sendingar, har dygd er í hásæti. Her er eisini rúmd fyri umstríddum sendingum, og soleiðis fer tað eisini framhaldandi at vera.

Eftir standur so, at vit hava sent eina sending, sum nógv fólk í heiminum kjakast um. Og her áttu vit at borið okkum øðrvísi at. Í blaðummælinum av sendingini skuldu vit havt sagt frá, at sendingin var umstrídd og víst til kjakið, sum stóðst av henni. Á henda hátt hevði hon ikki staðið einsamøll sum ein vísindasending, soleiðis at fólk fingu ta fatan, at hetta var einasta boð uppá sannleikan. Og vit kundu, sum bæði Uni Arge og Birgir Kruse vísa á, lagt upp til kjak, har t.d. Bogi Hansen tók lut. Men kjakið um veðurlagsbroytingar og avleiðingar heldur fram, og tað kemur als ikki uppá tal at tiga nakran part burtur.